TIGER taljur
Lyftiorka
500 kg
1000 kg
1500 kg
2000 kg
3000 kg
5000 kg

TIGER Pull - lift taljur
Lyftiorka
750 kg
1500 kg

TIGER Mini Pull - lift
Lyftiorka
250 kg
Vekt: bert 2,15 kg
500 kg
Vekt: bert 3,90 kg
Tær nýtist ógvuliga lítið pláss
Vit útvega eisini el-taljur
THOMAS DAM amboð & maskinur
Tel. 31 04 44 • Fax 31 78 38

BILAR TIL SØLU

Volvo 440 TDI Diesel
Ár. 06-1994

Audi 100 Limosine
2,5 TDI Diesel
Ár. 10 - 1993
Sóltak · alufelgur · radio / cas. o.a.

Audi 100 2,5 TDI
Avant Diesel
Ár. 11 - 1992
Sóltak · alufelgur · viðfestikrók · radio / cas. o.a.

Audi 80 1,9 TDI Diesel
Ár. 06 - 1994
Sóltak · radio / cas. o.a.

BMW 525 tds
Ár. 03 - 1994
Sóltak · radio / cas. o.a.

Myndir síggjast á www.bilar.fo
Úrvalsbilar Spf.
530 Fuglafjørður
tel. 444943 - fax 444638 - far. 217704

PF. Restoffs ASSU

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3193

Navn: Sp/f Norðberg

Adressa: 740 Hvannasund

Kommuna: Hvannasunds Kommuna
Stovningardato: 22.06.2001
Viðtøkudato: 22.06.2001
Kapitalur: Kr. 100.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 100.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Poul Johs. Simonsen, 740 Hvannasund.
Stjórn: Poul Johs. Simonsen, 740 Hvannasund.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Føroyabók, Vágstún 2, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, handil og annað starv í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir um umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 9. juli 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3194

Navn: Sp/f Nevið Reyða

Adressa: 750 Viðareiði

Kommuna: Viðareiðis Kommuna
Stovningardato: 26.06.2001
Viðtøkudato: 26.06.2001
Kapitalur: Kr. 250.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 250.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Hans Sylvan Jacobsen, 700 Klaksvík og Hendrik Sørensen, 750 Viðareiði.
Stjórn: Hans Sylvan Jacobsen, 700 Klaksvík og Hendrik Sørensen, 750 Viðareiði.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Føroyabók, Vágstún 2, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, handil og annað starv í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir um umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 9. juli 2001

Kristin Balle

Søkt verður eftir

dagrøktarmammu

at byrja 20. august, fyribils í hálvt ár.

Umsóknir skulu vera dagrøktini í hendi seinast 16. juli.

Dagrøktarskipanin
í Sjóvar Kommunu
490 Strendur

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3206

Navn: Sp/f Vørðslan

Adressa: 530 Fuglafjørður

Kommuna: Fuglafjarðar Kommuna
Stovningardato: 29.06.2001
Viðtøkudato: 29.06.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: P/F S.V. Transport, 530 Fuglafjørður (P/F 1878).
Stjórn: Kirstin Vørðhamar, 530 Fuglafjørður.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøsgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 29.06.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 9. juli 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2854, Sp/f Hemo, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 28.05.2001.
Kapitalur: Hækking við kr. 10.000,00 til kr. 90.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 10.000,00 til kurs 100

Skráseting Føroya tann 9. juli 2001

Kristin Balle

Skrásetingar-nr. Sp/f 2309, Sp/f Nordic Sefood, 100 Tórshavn
Skrásetingar-nr. P/F 2557, P/F Karvi, 530 Fuglafjørður

Í dag eru niðanfyri standandi felog í likvidatión strikað úr partafelagsskránni:

Skrásetingar-nr. P/F 1993, P/F Harðaberg, 240 Skopun
Skrásetingar-nr. Sp/f 2801, Sp/f Boðaberg, 240 Skopun
Skrásetingar-nr. Sp/f 2869, Sp/f Matr. Nr. 723 H, 100 Tórshavn

Í dag eru niðanfyri standandi felog undir trotabúarviðgerð strikað úr partafelagskránni:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2624, Sp/f Damsmíð, 100 Tórshavn
Skrásetingar-nr. P/F 2822, P/F North Atlantic Provider, 360 Sandavágur

Skráseting Føroya tann 5. juli 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2331, Sp/f Pure Water, 700 Klaksvík.

Viðtøkur broyttar: 25.05.2001.
Kapitalur: Hækking við kr. 2.444.000,00 til kr. 6.844.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 2.444.000,00 til kurs 100
Nevnd: Farin úr nevndini: Eyðbjørn Poulsen, Kommunubrekka 7, 700 Klaksvík
Innkomin í nevndina: Jógvan Djurhuus, Peder Andersensvej 1, DK-9850 Hirtshals.

Skráseting Føroya tann 9. juli 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2089, P/F Kassavirkið á Bakka, 625 Glyvrar.

Viðtøkur broyttar: 21.03.2001.
Nýtt navn: P/F Bakkafrost
Nýtt hjánavn: P/F Kassavirkið á Bakka (P/F Bakkafrost)

Skráseting Føroya tann 9. juli 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 3187

Navn: P/F Statoilstøðin á Argjum

Adressa: Postbox 2105, 165 Argir

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 20.06.2001
Viðtøkudato: 20.06.2001
Kapitalur: Kr. 3.530.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 3.530.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Egon Danielsen, Leitisgøta 10, 160 Argir.
Nevnd: Conny Danielsen, Leitisgøta 10, 160 Argir (formaður), Egon David Danielsen, Leitisgøta 10, 160 Argir og Sólbjørg Zachariassen, Traðagøta 17, 160 Argir.
Stjórn: Egon David Danielsen, Leitisgøta 10, 160 Argir.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum ella av allari nevndini í felag.
Grannskoðari: : Sp/f AB-grannskoðan, Sleipnisgøta 12, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og tað, sum stendur í samband við hetta.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 6. juli 2001

Kristin Balle

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin
i

Mentamálastýrið
Mentamáladeildin

Mentamálastýrið letur árliga stuðul til ymisk tiltøk og verkætlanir. Við hesum verður lýst leyst at søkja um stuðul av niðanfyri nevndu stuðulsmøguleikum.

Stuðul til barna- og ungdómsarbeiði

Tann upphædd, ið Mentamálastýrið umvegis sp/f Ítróttarvedding fær burturav veddingarpeninginum, verður at nýta til verkætlanir og tiltøk til gagns fyri børn og ung.

Tey, ið skipa fyri tiltøkum og standa fyri verkætlanum, sum eru børnum ella ungum til gagns, eru vælkomin at søkja.

Stuðul til framleiðslu a føroyskum loftmiðlatilfari

Á fíggjarløgtingslógini 2001 eru kr. 1.000.000 játtaðar til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari. Nakað av peningi er eftir á hesari játtan.

Tey, ið arbeiða við ella ætla at fara undir at framleiða føroyskt loftmiðlatilfar, eru vælkomin at søkja.

Studningur til myndlistafólk

Á fíggjarløgtingslógini 2001 eru kr. 40.000 játtaðar til studning til myndlistafólk, sum sýnt hava góðar gávur.

Tey, ið ætla sær ella eru farin uttanlands at búgva seg út í málara, myndhøggara- ella aðrari myndlist, eru vælkomin at søkja.

Við umsóknini eiga at verða allir viðkomandi upplýsingar um útbúgvingina, sum peningurin ætlandi skal nýtast til og um útbúgving áður.

Allar umsóknir eiga at verða skrivaðar á serstakt umsóknarblað til endamálið. Umsóknarbløð og vegleiðingar eru at finna á internetinum á: *www.mms.fo* ella fáast við at venda sær til:

Mentamálastýrið
Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 35 50 50 — Telefax 35 50 55
e-postur.: mms@mms.fo

Umsóknirnar skulu verða Mentamálastýrinum í hendi innan **hósdagin 6. september 2001**. Tey, ið ynskja at vita meira um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Mentamálastýrið á telefon 355050.

PRÝÐISLUTIR
VIÐ MOTIVUM ÚR NORRØNU GUDALÆRUNI

TÝR

NÁTT OG DAGUR

Anker Eli Petersen hevur designað eina spennandi rað av prýðislutum við motivum úr norrønu gudalæruni. Her eru 2 motiv - fleri eru at velja ímillum.

Prýðislutirnir verða latnir í gávueskju við fittligum bóklingi um hvønn einstakan prýðislut.

Eitt frálikt **gávuhugskot** - til studentin, føðingardagsbarnið, konfirmantin...

3arin

SMS · Tel 353535 · Fax 353536 · www.3-arin.com · 3-arin@3-arin.com

KIA CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar

Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600

Kundi tú hugsað tær at arbeitt við telesamskifti?

"Um framtíðina er at siga, at tú ikki skalt síggja hana, men gera hana møguliga"
- Antoine de Saint-Exupéry



Vit sóknast eftir einum starvsfelaga, sum er áhugaður í at at arbeiða við telesamskifti í støðugari menning á Transmissóndeildini hjá Føroya Tele.

Í starvinum fært tú nógvar nýggjar avbjóðingar í einum spennandi og broytiligum umhvørvi saman við dugnaligum starvsfelagum, har vit leggja dent á gott samstarv ímillum starvsfelagar og ikki minst við viðskiftafólkið.

Uppgávur tínar vera bæði innanhýsis og mótvegis viðskiftafólkum, m.a. fert tú at arbeiða við:
- Beinarum/beinaranetum (routarum/routaranetum)
- Trygdarskipanum (firewalls)
- Leigaðum linjum til tele- og datatænastur
- Telekervinum í Føroyum og til útlond
- Framtíðar tænastum (t.d. IP-telefoni)

Kervið er uppbygt við nýggjastu tele-/datatøkni á ljósleiðarum, radiolinjum og koparlinjum.

Tú hevur fyrimun, um tú:
- Í stóran mun dugir at arbeiða sjávstøðugt og ert nærlagdur/nærløgd
- Er fyrikomandi og dugir at tosa við viðskiftafólk
- Kann halda tíðarfreistir mótvegis viðskiftafólki
- Hevur góðan kunnleika til enskt
- Hevur kunnleika ella royndir við TCP/IP
- Hevur kunnleika ella royndir við beinarum (routarum)
- Hevur eina tekniska útbúgving, aðra viðkomandi útbúgving ella royndir við telesamskifti

Tað, ið tú ikki dugir, tá tú kemur, læra vit teg við síðumansupplæring og skeiðum.

Tú ert vælkomin at venda tær til Dan Olsen á telefon 24 33 34, um tú hevur spurningar til starvið.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag.

Umsókn við avritum av møguligum prógvum skulu verða Starvsfólkadeildini hjá Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 30. juli 2001 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Box 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisfleytninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krav til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vil vera við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum!